## DAGSINS MEINING

# Frambrot fyri Suðuroy

Klokkan 15:00 hin 7. september 2005 varð so sáttmálin millum Landsverk og Ístak á borðinum í fundarhølinum hjá Landsverki í Tórshavn og so varð undirskrivað. Langt um leingi er er tað komið hartil, at tunnilin millum Hov og Ørðavík fer at gerast veruleiki. Tað kann vera torført hjá fólki uttan fyri oynna ímynda sær, hvussu ómetaliga stóran týdning hendan verkætlan fer at hava fyri gerandislívið, vinnulívið og menningina í Suðuroy.

Við lisitatiónina hjá Landsverki 12. juli 2005, gjørdist úrslitið, at íslendska fyritøkan Ístak hevði lægsta boðið av fýra - kr. 126.668.934,- uppá arbeiðið at gera vega- og tunnilssamband millum Øravík og Hov. Eini 20 fólk stukku inn á gólvið hjá Landsverki hendan dagin. Umframt sjálva undirskrivingina vóru tvær smærri framløgur um verkætlanina. Hetta er ein roynd at skapa meira opinleika og geva fólki betri innlit í verkætlanina, og hvussu alt arbeiðið verður skipað . Tað royndist eftir øllum at døma væl og er avgjørt nakað, sum Landsverk eigur at halda fram við.

Suðuroyggin hevur sum kunnugt stórar búskaparligar trupulleikar. Arbeiðsloysisprosentið er 7 og tungt gongur við at fáa hjólini í sunnaru helvt at mala aftur. Tó eru glottar eitt nú við, at arbeiðsloysisprosentið er fallið - tað var 9 fyri hálvum ári síðani. Eitt gott infrakervi er ein meginforreyt fyri menning. Við tunnlinum millum Hov og Øravík verður infrakervið og infrabygnaðurin í oynni munandi betur og er sostatt ein meginfortreyt fyri menning lokin. Tunnilin kemur so at siga at gera oynna til ein bý og hevur hetta stóran týdning fyri heilsuverk, útbúgving og vinnulív í oynni

Um ein góðan mánaða kemur nýggi Smyril í sigling millum Suðuroynna og meginlandið. Henda hending fer ikki at hava minni týdning fyri oynna. Gott og regluligt samband við meginøkið er onnur fortreytin fyri menning og trivnað í Suðuroy. Smyril verður so at siga landavegur suðuringa millum høvuðstaðin og lokalsamfelagið. Tað er tí umráðandi, at fók og vinnulív í oynni fáa sum mest burturúr hesari íløgu. Smyril má sigla minsta tríggjar ferðir um samdøgurði millum Drelnes og Havnina, og farmagjøldini eiga at vera til at bera hjá vinnuni. Hetta verður dýrt, men tað verður sum frá líður enn dýrari ikki at veita suðringum ta best møguliga tænastuna.

**Sosialurin**

# FJM heiðrað fyri nýhugsan

HEIÐUR

Á samkomu fyri framsýnarum á Icefish framsýningini í Íslandi í gjár, bleiv FJM og Skagin, sum er samstarvfelagið hjá FJM, heiðrað fyri størstu nýhugsan á framsýningin. Orsøkin til hendan heiður er teirra nýggja flaka skerimaskina, sum skerir bein úr fiski við vatnstrálum.

Talan er um frukta gott samstarv millum føroyska felagið FJM í Rúnavík og íslendska felagið Skaginn í Akranesi. Íslendska felagið er veitari av flowlinjum til flakavirkir og hevur sín førleika í góðum stálarbeiði, meðan parturin hjá FJM í hesum prosjektinum er tøknin at stýra maskinunum.

Seinastu 15 árini hava fleiri fyritøkur roynt seg við flakaskerimaskinum sum brúka vatnstrálir at skera við í staðin fyri vanligar knívar. Hetta hevur ikki eydnast hjá nøkrum fyrr enn nú hjá FJM og Skaginn.

Fyrsta maskinan er seld og verður í løtuni royndarkoyrd á einum flakavirki í Kópavági. Tann maskinan hevur 2 skerilinjur við tveimum skeridýsum á hvørjari linju. Nýggja maskinan kann koma at kollvelta tann vanabundna háttin at reinskera fløk við hond.

Nýggja maskinan verður eisini sýnd fram á Icefish framsýningini á básinum hjá Skaginn.



*Arne Carlsen prosjektleiðari er sera glaður fyri heiðurin*

# Fundur um TFT og aðrar øðrvísi viðgerðarhættir

Nú er hann aftur her, Lars Mygind, og fer at halda fyrilestur í B 36-húsinum týskvøldið 13. septembur kl. 19.00. Hann fer at greiða frá seinastu hættunum innan lekidóm og orkuheilivág. Lars er millum undangongumenninar í Danmørk innan øðrvísi (alternativa) viðgerð, og bæði viðskiftafólk og lærlingar hansara uppliva tað, ið av og á nærum kann samanberast við undurverk.

Lars Mygind hevur verið í Føroyum fleiri ferðir áður og greitt frá TFT, ið er stytting fyri Thought Field Therapy, ein viðgerðarháttur, ið vindur skjótt upp á seg kring heimin allan. Hetta kvøldið fer hann umframt TFT eisini at at greiða frá andadráttarviðgerð, djúphugsan (meditation), mati, látri og dukandi elektromagnetiskum økjum, sum somuleiðis tekur seg fram og vísir seg at veita linna og lekidóm.

Sum kvøldið líður, fer Lars at veita viðgerð og sýna, hvussu hesir viðgerðarhættir kunnu hjálpa og kanska lekja, um alt gongur eftir vild.

Fyrrapartin mikudagin 14. septembur hevur hann eina miniworkshop um somu evni, og har fáa fólk eisini høvi til at læra meiri um hesar viðgerðarhættir og um, hvussu ein kann læra til viðgera (terapeut).

Miniworkshoppin verður í hølunum hjá Sp/f Koyrikortinum í Slættanesgøtu 5. Til ber at boða frá luttøku týskvøldið í B36-húsinum ella við at ringja 318821 ella 218777.

Í heyst roynir Lars Mygind seg sum rithøvund saman við konu sínari Hanne Heilesen, tá ið tey á forlagnum Borgen geva út bók um TFT. Hetta er fyrsta bókin á donskum um hetta evnið.

Uppvaksin í sjónleikaraumhvørvi (sonur Jytte Abildstrøm og bróðir Peter Mygind) dugir hann sera væl at greiða frá einum álvarsomum og djúpum evni soleiðis, at flestu áhoyrarar fáa spent láturvøddarnar væl og virðiliga kortini.

Fundurin í B36-húsinum og miniworkshoppin eru ókeypis, og kaffi verður at fáa.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.